# Kjak



**Annita á Fríðriksmørk**
*framsøgufólk Tjóðveldis í skúlamálum*

## Styrktur fólkaskúli ella ein hóttan

"Størri og sterkari eindir", "færri og sterkari pedagogiskar leiðslur" osfr. Hetta er tað, sum Javnaðarflokkurin, og nú eisini løgmaður, lova føroyingum við nýggja fólkaskúlareforminum.

Hyggja vit so nærri at, hvat tað er, sum skal gera eindirnar størri og færri og sterkari, so siga tey, at tað eru teir 13 bygdaskúlarnir kring landið, sum hava 20 næmingar ella færri, sum nú skulu niðurleggjast, og næmingarnir koyrast í størru grannaskúlarnar.

Trupulleikin við hesi ætlan er tó, at teir næmingar, sum koma inn á størru skúlarnar eru so fáir í tali, at teir muna so lítið í í næmingatali.

Vit tosa um at flyta íalt 100 børn av 13 ymiskum smáplássum til uml 8 størri skúlar. Tvs at allir hinir uml 30 skúlarnir í landinum, sum ikki skulu taka móti børnum av smáplássum koma at halda fram júst sum nú, meðan 8 størri skúlar fáa nakrar heilt fáar næmingar afturat.

Tað er tað, sum landsstýrið kallar reform.

Um næmingatalið økist út tildømis 400 upp í t.d. 408 hevur onki við styrktar eindir at gera ella effektivari leiðslur.

### So eru tað tey, sum velja smáplássini

Nógv tey flestu av okkum vilja hava, at børn okkara ganga í stórum skúlum, har nógv børn eru at verða saman við, og har tey hava eitt fjølbroytt úrval av lærarum, við differentieraðari og tvørfakligari undirvísing, við bólkaarbeiði, har lærarar sparra hvønn annan osfr osfr osfr. Hesir møguleikar eru avmarkaðir í einum skúla, har tað ganga millum 2 og 20 næmingar. Og millum annað tí, eru tað so fá, sum velja tann møguleikan.

Men so eru tað tey, sum velja smáplássini kortini.

Hetta eru tey, sum tryggja Føroyum eitt ávíst mentanarligt fjølbroytni. Sum tryggja, at vit ikki verða so einstáttað, sum vit vildu verið, um vit bara høvdu býarmentan og stórbygdamentan.

### Felagsskapurin í bygdasamfelagnum

Treytin fyri trivnaði á smáplássinum er fyrst og fremst, at tey hava okkurt at verða felags um. Ikki Rennibreyt, Norðurlandahús, ella SMS, men okkurt, sum stendur í mát við tað bygd, tey hava valt at búgva í.

Her spælir skúlin ein sentralan leiklut. Hann er staðið, tey hava til felags. Hervið er ikki sagt, at skúlin bara skal verða har fyri felagsskapin. Hann skal sjálvandi primert verða har fyri børnini. Skúlin skal verða har fyri at tryggja teimum ein skúla í nærumhvørvinum, ein skúla har tey kenna seg heima, har tey trívast og mennast tey fyrstu skúlaárini.

Um skúlin fer úr bygdini er nógv størri møguleiki fyri, at trivnaðurin í bygdini fer, enn um skúli er í bygdini. Í so máta hevur hann stóran týdning fyri felagsskapin.

### Handlarnir, bankarnir, posthúsini og nú skúlin

Vit tosa um bygdir, har nærum øll tey, sum róku privat virksemi góvust fyri nøkrum árum síðani. Handlarnir lótu aftur ein og ein, bankarnir tað sama og nú eisini posthúsini. Hetta eru stovnar sum skulu rekast eftir marknaðartreytum.

Tað almenna hevur onnur atlit at taka. Hevði tað ikki tað, skuldu øll bara flutt til Havnar ella kanska enntá av landinum, tí tað man loysa seg betri. Men tað almenna atlitið í hesum høpi er at síggja skúlan, sum eitt stað, har børnini trívast og mennast og læra. Staðið har tey, tey fyrstu skúlaárini kenna hitan frá tí heimliga umhvørvinum. Minnist til, vit tosa um børnini, - ikki tey hálvvaksnu.

### Børn hava ymisk ynski

Hinvegin, so er tað ógvuliga ringt at generalisera, tá vit tosa um børn og um skúla Og í hesum orðaskiftinum tosa vit ikki um fjøldina av skúlabørnum. Vit tosa, um tey fáu, sum ynskja at búgva á smáplássinum. Tey, sum ynskja at ganga í skúla har. Og møguliga tey, sum eru potentiell framtíð á smáplássinum.

Vit tosa sjálvandi eisini um tey børn, sum búgva á smáplássum, og sum ynskja at flyta til størri skúla at ganga. Tað eru tað ivaleyst fleiri ella nøkur sum gera. Er tað so, skal tað almenna sjálvandi ikki forða teimum í tí. Men so harfrá og at krevja tað av teimum, tað kann í longdini gerast ein dýr søga.

### Smábygdirnar eru við til at ríka okkara mentanarlív

Vit tosa um børn, sum vaksa upp úti á einum av smáu bygdum okkara. Tey sum hava betri møguleika at mennast og trívast og læra har. Í mun til um tey hvønn morgun verða at fara úr heimbygdini til ein stóran skúla til seint seinnapartin, tá ið skúlabarnaflutningurin flytur tey heimaftur til heimbygdina.

Talan er hóast alt um børn, sum vaksa upp hjá foreldrum, sum hava valt ta lítlu bygdina, og tað lív og mentan, sum har er. Hetta eru tær fáu familjur, sum eru við til at ríka okkara mentanarlív. Tær sum tryggja ávíst fjølbroytni í samfelagnum. Tær, sum tryggja, at okkurt er, sum víkir frá býarmentanini og stórbygdamentanini; - tí mentan, sum eg og nógv við mær raðfesta sum okkara fundament.

Býarmentanin kemur "altíð" at verða dominerandi, og hevur automatiskt tilflytarar. Men so er ikki við bygdamentanini. Hennar yvirliving er ikki nøkur sjálvfylgja.

Aðrastaðni gevur man útjaðarastuðul ella skattafrádrátt til tey fáu, sum vilja búgva langt burtur frá teimum sentralu økjunum. Hetta verður gjørt tí man veit, at tað fyri heildarsamfelagið er ríkari, um tað eisini er lív í økjum kring alt landið.

Vit tosa ikki um at eggja 100 tals fólkum at fara út á smáplássini. Vit tosa um at virðismeta tey fáu, sum hóast alt trívast úti á bygd. Tey gera Føroyar nógv ríkari mentanarliga, enn um hesi øki stóðu fólkatóm.

### Fólkaskúlin í tølum

Fólkaskúlin kostar 276 mió krónur tilsamans. Teir skúlar, sum hava 20 næmingar ella færri, eru 16 í tali. Av hesum eru tríggir skúlar, sum eru á útoyggj, har ikki er siglandi aftur og fram dagliga, og sum samgongan tí neyvan hevur ætlanir um at flyta av oyggj. Nú eru 13 skúlar, sum ætlandi skulu flyta. Hetta eru skúlarnir í Nólsoy, Sumba, Oyndarfirði, Haldarsvík, á Húsum/Syðradali, Skálavík, Mikladali/á Trøllanesi, Funningi, Kunoy, Haraldssundi, Tjørnuvík, Fámjin og í Hovi. Hesir hava millum 2 og 20 næmingar í hvørjum skúla og kosta einar 18 mió kr.

Um grundgevingin er, at spara, so kostar tað at í hinum endanum í skúlabarnaflutningi, í mistum skatti frá lærarum, og í skúlagjaldið til grannakommununa.

Havi skilt, at landsstýrið heldur seg spara einar 7 mió kr við reforminum. 7 mió kr fyri at taka felagsskapin úr bygdamentanini.

Hetta er tað tey kalla skúlareform...

Helt, at hesin vinkulin var neyðugur í støðutakanini hjá samgonguni, sum eg haldi hevur selt ein reform, sum ikki hevur tað innihald , tey hava reklamerað við.



**Hákun Djurhuus**
*Stjóri í SEV*

## Um orkukeldur og elprísir

Viðmerkingar til oddagrein í Dimmalætting undir heitinum "Sev stríð".

Í oddagreini í Dimmalætting 6. januar 2011 verður sóknast eftir, at SEV kemur "meira alment fram við, hvørjar ætlanir felagsskapurin hevur".

"Liggja aðrar ætlanir í kortunum enn bara vatnorkuútbyggingin?" verður m.a. spurt, og víst verður í hesum sambandi á, at "fleiri eru farin at ivast í, um vatnorkuútbyggingin er einasti vegurin at ganga".

Til hetta er at siga, at SEV ongantíð hevur sagt, at vatnorka er "einasti vegurin at ganga". Tvørturímóti verður og hevur eisini verið arbeitt við vindorku, sjóvarfallsorku og alduorku, sum tó nú er steðgað, tí landsstýrið ikki tók undir við ætlanini.

### Vindorka

SEV hevur síðani byrjanina av 2009 verið til reiðar at fara undir munandi vindorkuútbygging í Neshaga. Sum kunnugt fer útbygging av vindorku í dag fram eftir nýggju elveitingarlógini og verður stýrd av Elveitingareftirlitinum smbrt. útdelegering frá Vinnumálaráðnum.

Í sambandi við útbjóðingina hjá Elveitingareftirlitinum av vindorku, har tilboðini skulu vera inni 11. februar, verður SEV millum tilboðsgevararnar.

SEV arbeiðir eisini seriøst við øðrum vindorkuloysnum.

### Oljuprísurin

Umráðandi er tó í øllum orðaskiftinum um príshækking v.m. at gera sær greitt, at raksturin hjá felagnum fyrst og fremst má hanga saman, og her eru tað hækkaðu oljuprísirnir, sum hava skapt størstu trupulleikarnar.

Hvørt tær ymisku orkuloysnirnar úr vatni, vindi, sjóvarfalli o.ø. eru dýrari í mun til hvør aðra ella ikki, er torført at meta um. Ymiskt er, hvussu íkastið ávirkar veitingartrygdina, eins og loysnirnar eisini hava ymiska livitíð.

Viðvíkjandi opinleikanum mótvegis almenninginum er at siga, at SEV regluliga kunnar um virksemi sítt t.d. á aðalfundum (sum eru almennir), í árs- og fundarfrágreiðingum, á heimasíðuni og í sambandi við fyrispurningar frá fjølmiðlum og almenninginum annars.

### Elprísir her og har

At halda uppá – so sum gjørt verður í oddagreinini – at elprísirnir í grannalondunum eru nógv lægri enn í Føroyum, vilja vit fegin síggja skjalprógvað. Hagtøl, vit kenna til, vísa hesum aftur.

Prísirnir í grannalondunum eru ein samanseting av framleiðslu- og netkostnaði og avgjøldum v.m. Almennur stuðul til framleiðararnar framgongur ikki av prísinum.

Nevnt kann í hesum sambandi vera, at t.d. danska orkufelagið Dong Energy fær almennan stuðul uppá væl omanfyri 1 kr/kWh fyri vindorkuútbyggingar í Danmørk, Týsklandi og Bretlandi smbrt. grein í Børsen 13. september 2010.

Annars er tað misvísandi at samanbera framleiðslukostnað og elprísir í einum lítlum fjarskotnum og isoleraðum oyggjasamfelag við prísir í stóru grannalondunum, sum eru samanbundin í felags net og hava stórrakstrarfyrimunir í framleiðsluni.

At enda skal verða sagt, at SEV heilsar orðaskifti um elorkuútbygging vælkomnum og luttekur framhaldandi fegið í kjakinum.

***Við nýggjárskvøðu og vinaligari heilsan***